# Føroyska operan út í heim

**Í næstu viku fer fyrsta føroyska operan á pall í Norðurlandahúsinum. Hetta er sjálvandi ein stórhending í Føroyum. Men ætlanin er ikki bara at framføra hana her heima hjá okkum. Fleiri tiltøk eru sett í verk fyri at kunna úthemin um operuna, og stórur áhugi hevur verið fyri henni uttanlands**

MENTAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*





*Arbeitt hevur verið við at kunnað útlendingar um føroysku operuna Í Óðamansgarði, ið er bygd á stuttsøgu hjá Williami Heinesen. Nú tykist arbeiðið at bera frukt. Nýggj heimasíða er gjørd um operuna, og fleiri útlendskir ummælarar koma hendanvegin at uppliva operuna*

Mikudagin 11. oktober koma 6 útlendsk fjølmiðlafólk til Føroya, ið øll skulu ummæla føroysku operuna, Í Óðamansgarði, sum hevur frumsýning kvøldið eftir. Tey umboða kend tónleikatíðarrit uttan úr heimi so sum týska Opern-Welt, Early Music Today og Music Magazine Rondo, men eisini kendar avísir sum enska The Times og danska Politiken.

Hetta er dømi um tann áhuga, sum útlendskir fjølmiðlar hava víst fyrstu føroysku operuni, sum Sunleif Rasmussen hevur skrivað til tekst hjá Dániali Hoydal.

Stórt arbeiði hevur verið lagt í at kunna umheimin um operuna, og vitjanirnar eru beinleiðis úrslit av hesum.



Men umframt fjølmiðlarnar eru eisini leikhús í t.d. Svøríki, Danmark, Íslandi og Wales, sum hava víst áhuga fyri nýggja føroyska tónleikaverkinum.

### DVD og heimasíða

Serstakt fyri hesa framførsluna av operuni er eisini, at Kringvarp Føroya er farið í samstarv við danska forlagið DaCapo Records um at gera eina DVD við føroysku operuni. Ein donsk fyritøka fer at standa fyri at framleiða DVDina við kenda danska framleiðaranum Uffe Borgwardt á odda, og afturat sær hevur hon eina royna føroyska manning frá bæði útvarps- og sjónvarpsdeilini hjá Kringvarpinum. Á DVD-fløguni verður umframt framførsluna samrøður við fleiri teirra, sum standa aftan fyri verkætlanina.

DaCapo ætlar at selja hesa DVD um allan heim, og tí skal hon umsetast til 5 onnur mál. Fyribils er leikritið umsett til enskt.

Ein onnur roynd at skapa áhuga fyri operuni uttanlands er nýggj heimasíða á enskum www.themadmansgarden.com. Fyribils er síðan ætlað tíðindafólki, ummælarum og øðrum, ið fáast við tónleik burturav, men tosað hevur verið um, eisini at fingið eina týsktmælta heimasíðu, so hon røkkur eini upp aftur størri fjøld.

# Heitasti september í Føroyum í 116 ár

**September í ár setti eisini nýtt hitamet í grannalondunum, men tað greiðasta metið var í Føroyum.**

VEÐUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



Tað var lýtt í veðrinum í september, og nú hevur danska veðurstovan roknað seg fram til, at tað var ikki bara lýtt, men sjáldsama lýtt. Tølini hjá DMI vísa, at meðalhitin í Tórshavn var 11,5 stig í síðsta mánað, og so lýggjur hevur september ikki verið, síðani hitamátingarnar byrjaðu í Føroyum í 1890. Tað gamla metið var í september í 2002, tá meðalhitin í Havn var 11,1 stig.

Meðalhitin í Havn í september er annars 9,1 stig, og sostatt var september í ár heili 2,4 stig lýggjari enn undanfarin ár í meðal.

Men tað var ikki bara í Havn, at september var sjáldsama lýggjur. Á flogvøllinum í Vágum var meðalhitin í síðsta mánað 11,3 stig, og so lýggjur hevur september ikki verið, síðani mátingarnar byrjaðu á flogvøllinum í 1963. Eisini í Akrabergi og Mykinesi setti meðalhitin nýtt met. Í Akrabergi var meðalhitin í síðsta mánað 10,8 stig, og tað er tað mesta síðani 1961, men munurin ímillum september í ár og í 2002 er kortini lítil, tí tað árið var meðalhitin í Akrabergi 10,6 stig í september. Í Mykinesi var meðalhitin 10,7 stig, og tað er eisini tað mesta tey seinastu 45 árini. Men september var eisini lýggur í Mykinesi í 2002. Tá var meðalhitin 10,4 stig.

Á Kirkju var eitt sindur øðrvísi. Har var meðalhitin í september 11,4 stig, og tað var hann eisini í 2002, men tað er eisini mesti meðalhiti í september í Fugloy, síðani mátingarnar har byrjaðu í 1987.

### Eisini aðrastaðni

Tað var ikki bara í Føroyum, at september var lýggjari enn vanligt. Í Reykjavík var meðalhitin 10,5 stig. Tað var meiri enn trý stig oman fyri tann vanliga meðalhitan, og so lýtt hevur tað ikki var har í september síðani í 1958.

Í Noregi var september eisini metlýggjur og serliga í Suðurnoregi. Í Oslo var meðalhitin 15 stig, og tað var 4,2 stig oman fyri tað vanliga. So lýtt hevur tað ikki verið í norska høvuðsstaðnum í september, síðani hitamátingarnar har byrjaðu í 1867, sigur norska veðurstovan.

Eisini danir fingu ein góðan september í ár. Meðalhitin har var 16,2 stig, og tað er tað sama sum gamla metið frá 1999.